Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

*06. oktober 2022*

# UMMÆLISSKRIV

***viðvíkjandi***

**Uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan
(Barsilslógin)**
(Hækking av inngjaldi og útgjaldi o.a.)

Høvuðsendamálið við uppskotinum er at hækka hámarksupphæddina, úr núverandi 25.000 um mánaðin, og upp í 27.000 kr. um mánaðin. Fyri at fíggja hesa hækking verður barsilsgjaldið í sama viðfangi hækkað úr 0,86% og upp í 0,89%.

BLF hevur leingi havt ta áskoðan, at núverandi hámarksupphædd er ov lág. Hon hevur staðið í stað líka síðan hon í 2004 var lækkað úr 35.000 kr. og niður í núverandi 25.000 kr., og er tí ikki hóskandi longur. Víst verður í hesum sambandi til skriv frá akademisku fakfeløgunum um betri barsilssømdir og javnstøðu millum foreldur, ið varð sent landsstýrismanninum tann 14. september 2022.

Lógin er soleiðis, at gjaldið er í prosentum av A-inntøkuni, meðan hámarksupphæddin er ein føst upphædd. Hetta hevur við sær, at avlopið í grunninum veksur sum frálíður, tí inngjaldið pr. persón hækkar við lønarvøkstrinum, meðan útgjaldið pr. persón stendur í stað. Hesi avlop eru seinastu nógvu árini næstan bara brúkt til at leingja um barsilstíðina. Her vil BLF loyva sær at mæla til, at avlopini frameftir í størri mun fara til at hækka hámarksupphæddina, soleiðis at hon komandi árini kann vaksa upp til eitt hóskandi støði.

**Vinarliga**

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**